- Farið undir “Gennemse”, har kunnu tit góðtaka, rætta og sletta viðmerkingar o.a.



- Tá eftirkannað verður, velja vit funkuna “Registrer ændringer”, so tit síggja hvat Lógartænastan hevur tillagað og viðmerkt.
- Minnist til at deaktivera funkuna, áðrenn tit senda skjalið til Løgtingið ella til kunngeringar.



- Í valskránni kunnu tit velja ymiskar útgávur av skjalinum.

- Sbrt. Rundskrivunum á økinum, skulu tær teknisku rættingarnar góðtakast. Tó ikki um mett verður, at Lógartænastan hevur mistikið seg.
- Um mett verður, at Lógartænastan hevur mistikið seg, skal hetta fráboðast Lógartænastuni.



- Ein kann góðtaka rættingarnar eina og eina, ella allar í einum.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
(Frágreiðandi heiti)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Persónur, sum í sínum setanarviðurskiftum vinnur tænastumannaeftirløn, hevur ikki skyldu til at spara saman til egna eftirløn eftir hesi løgtingslóg við atliti at tí løn, hann forvinnur sambært tænastumannastarvinum."

2) § 3, nr. 2 verður strikað.

3) Í § 5, stk. 2 verður sum 2. pkt. sett:
"1. pkt. forðar ikki fyri, at eftirlønarveitari keypir tryggingar í útlendskum tryggingarfelagi, sum hevur fingið loyvi at reka virksemi í Føroyum, sbrt. løgtingslóg um tryggingarvirksemi, um inngjøld og útgjøld fara um afturhaldsskipanina."

4) Í § 9, stk. 1, 1. pkt. verður eftir "stk. 5" sett: "og 9".

5) Í § 9, stk. 2, nr. 2 verður "í eins stórum lutum" strikað.

6) Í § 9 verður sum stk. 9 sett:
"*Stk. 9.* Inngjald, sum persónur fevndur av § 1, stk. 5 ella § 17, stk. 5 hevur goldið, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur."

7) Í § 17, stk. 5, 3. pkt. verður aftaná "burtursíggingarrættur" sett: "og frádráttarrættur".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 2 kemur tó í gildi 1. januar 2015.

Kommentar [JSS1]: Vit mæla til at skriva orðini fult út. Hetta gerð tað lættari at leita í tekstinum digitalt.

- Tá teknisku rættingarnar eru góðtiknar, sær skjalið soleiðis út.
- Viðmerkingarnar verða ikki strikaðar, tá teknisku rættingarnar verða góðtiknar.

Vegleiðing um góðkenning av tøkniligum broytingum



- Støða verður tikin til innihaldið í viðmerkingini.
- Eftir hetta verður hon "markerað" og síðani strikað.
- Møguligt er at strika viðmerkingarnar eina og eina, ella allar í einum.

- Endaliga uppskotið, eftir at teknisku rættingarnar eru góðtiknar og viðmerkingarnar eru strikaðar.
- Klárt at senda Løgtinginum ella til kunngeringar. ☺

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
(Frágreiðandi heiti)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Persónur, sum í sínum setanarviðurskiftum vinnur tænastumannaeftirløn, hevur ikki skyldu til at spara saman til egna eftirløn eftir hesi løgtingslóg við atliti at tí løn, hann forvinnur sambært tænastumannastarvinum."

2) § 3, nr. 2 verður strikað.

3) Í § 5, stk. 2 verður sum 2. pkt. sett:
"1. pkt. forðar ikki fyri, at eftirlønarveitari keypir tryggingar í útlendskum tryggingarfelagi, sum hevur fingið loyvi at reka virksemi í Føroyum, sbrt. løgtingslóg um tryggingarvirksemi, um inngjøld og útgjøld fara um afturhaldsskipanina."

4) Í § 9, stk. 1, 1. pkt. verður eftir "stk. 5" sett: "og 9".

5) Í § 9, stk. 2, nr. 2 verður "í eins stórum lutum" strikað.

6) Í § 9 verður sum stk. 9 sett:
"*Stk. 9.* Inngjald, sum persónur fevndur av § 1, stk. 5 ella § 17, stk. 5 hevur goldið, kann rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur."

7) Í § 17, stk. 5, 3. pkt. verður aftaná "burtursíggingarrættur" sett: "og frádráttarrættur".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 2 kemur tó í gildi 1. januar 2015.